# Løgmálartáðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21. juni 2023 |
| Mál nr.: | 23/04504 |
| Málsviðgjørt: | NF |
| Ummælistíð: | 22. juni – 1. august |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka**
**(Rúsdrekkalógin)**

**§ 1.** Endamálið við hesi løgtingslóg er at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og samfelagið.

**§ 2.** Sum rúsdrekka er at skilja allur løgur, sum hevur minst 2,8 rúmprosent av alkoholi í sær.
*Stk. 2.* Sum rúsdrekka verður ikki roknað heilivágur, sum bert er loyvdur apotekum at selja eftir apotekaralóggávuni, hóast hesi hava í sær eitt alkoholrúmprosent, ið fer upp um 2,8.

*Framleiðsla og innflutningur*

**§ 3.** Tað er ikki loyvt at innflyta, framleiða ella selja rúsdrekka, sum í sær hevur meira enn 60 rúmprosent av alkoholi, ella gera drekkandi tær í § 4, stk. 2, nevndu vørur.

**§ 4.** Uttan mun til ásetingina í § 3 kunnu góðkend framleiðsluvirki innflyta rúsdrekka og ethanol við meira enn 60 rúmprosentum av alkoholi at brúka til rúsdrekkaframleiðslu.
*Stk. 2.* Apoteksverkinum er loyvt at innflyta og selja ethanol til tekniska nýtslu og til heilivágsframleiðslu eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.
*Stk. 3.* Treytað av, at landsstýrismaðurin hevur givið loyvi til tess og treytað av, at virksemið fer fram í hóskandi høli og undir hóskandi eftirliti, kunnu fyritøkur og einstaklingar innflyta smærri nøgdir av rúsdrekka og ethanoli til royndir og vørumenning. Tað er ikki loyvt at selja ella lata rúsdrekka, sum verður framleitt eftir hesi áseting.

**§ 5.** Rúsdrekka kann bara framleiðast á góðkendum framleiðsluvirki, samanber tó § 4, stk. 3.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann loyva rúsdrekkaframleiðslu, treytað av, at framleiðsluhølini eru góðkend , og treytað av, at framleiðarin og tollvaldið hava avtalað, hvussu alkoholavgjaldið verður roknað og goldið.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri treytir fyri hesi framleiðslu, undir hesum treytir fyri góðkenning, reglur um eftirlit við framleiðsluni o.a.

*Innflutningur av rúsdrekka*

**§ 6.** Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarætt at innflyta rúsdrekka, samanber tó §§ 7 og 8.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins.

**§ 7.** Ásetingin í § 6 er ikki galdandi fyri innflutning av víni, ætlað til altarnýtslu.

**§ 8.** Persónar, ið hava fylt 18 ár, og sum koma til landið við flogfari ella skipi, kunnu taka við sær rúsdrekka til egna nýtslu eftir reglum, ásettar í kunngerð.

*Søla og útflýggjan*

**§ 9.** Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarætt at selja rúsdrekka, samanber tó stk. 2.
*Stk. 2.* Loyvisnevndin kann heimila fyritøkum, sum framleiða rúsdrekka í Føroyum, at selja egna framleiðslu á framleiðslustaðnum eftir reglunum í § 7 í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi.
*Stk. 3.* Framleiðsla, nevnd í stk. 2, kann seljast Rúsdrekkasølu Landsins, eins og framleiðslan kann seljast beinleiðis til flogfør og skip í altjóða sigling, til tollfríar sølubúðir á flogvøllinum og á skipum í altjóða sigling, og til provianteringsfyritøkur, ið selja proviant til flogfør og skip í altjóða sigling. Tollvaldið hevur eftirlit við hesi sølu.

*Almennar ásetingar*

**§ 10.** Tað er ikki loyvt at selja persónum, yngri enn 18 ár, rúsdrekka, ella at selja persónum rúsdrekka, um tað er sannlíkt, at hetta er ætlað øðrum, sum ikki lúka treytirnar fyri at keypa rúsdrekka.
*Stk. 2.* Tann, sum selur, skeinkir ella letur skeinkja rúsdrekka, skal, um neyðugt við at síggja samleikaprógv, tryggja sær, at keyparin ella móttakarin er 18 ár ella eldri.

**§ 11.** Í føroyskum fjølmiðlum, undir hesum eisini talgildum miðlum og øðrum miðlum, sum venda sær til viðskiftafólk í Føroyum, er ikki loyvt at lýsa við sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka.

**§ 12.** Tað er ikki loyvt at útflýggja rúsdrekka frá handlum og líknandi handilshølum hjá handlum, fyritøkum ella á almennum støðum á ein hátt, ið kann metast við útskeinking.

*Revsing*

**§ 13.** Um ikki hægri revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, verður við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir revsaður tann, sum brýtur ásetingarnar í §§ 3-5 og 10-12. Medvirkni verður revsað á sama hátt.
*Stk. 2.* Við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir verður revsaður tann, sum ikki lýðir boð ella forboð, givin eftir løgtingslógini ella eftir reglum, givnar við heimild í løgtingslógini.
*Stk. 3.* Revsingin kann herðast til fongsul í upp í 1 ár, um brotið er framt tilætlað ella av grovum ósketni, ella um talan er um endurtøku.
*Stk. 4.* Í reglum, givnar við heimild í løgtingslógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir, givnar eftir reglunum, verður revsað við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir.
*Stk. 5.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 6.* Tá ið sekt verður ásett eftir stk. 1 og 2, ella eftir reglum, givnar við heimild í løgtingslógini, skal fyrilit havast fyri

fíggjarliga vinninginum, sum er fingin ella ætlaður var at fáa við brotinum.

*Gildisáseting*

**§ 14.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka úr gildi.

*Broyting í aðrari lóggávu*

**§ 15.** Í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi verður yvirskriftin upp yvir § 7 og § 7 orðað:

"*Søla av egnari framleiðslu*

**§ 7.** Loyvisnevndin kann loyva rúsdrekkaframleiðarum í Føroyum og rúsdrekkaframleiðarum, ið eru fevndir av Hoyvíkssáttmálanum, á egnum sølustað at selja ella lata egna framleiðslu sína av øli og cider, sum í sær hevur í mesta lagi 5,8 rúmprosent av alkoholi.
*Stk. 2.* Uttan mun til ásetingina í stk. 1 kann Loyvisnevndin heimila rúsdrekkaframleiðarum at bjóða ella selja vitjandi egna framleiðslu, ið Rúsdrekkasøla Landsins annars hevur einkarætt at selja.
*Stk. 3.* Loyvisnevndin kann taka aftur loyvi eftir stk. 1 og 2 eftir ásetingunum í § 16, um framleiðarin hevur brotið treytirnar fyri loyvinum. Afturtøkan kann verða avmarkað til ávís sølustøð.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri treytir fyri loyvi eftir stk. 1 og 2."

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Í samgonguskjalinum er ásett, at rúsdrekkaframleiðarar skulu fáa heimild at selja alla framleiðslu sína á framleiðslustaðnum.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Sambært galdandi lóggávu hevur Rúsdrekkasøla Landsins einkarætt at innflyta og selja rúsdrekka. Matstovur o.tíl., sum hava skeinkiloyvi, kunnu kortini skeinkja rúsdrekka, og bryggjarí, sum hava fingið loyvi til tess frá Loyvisnevndini, kunnu í egnum sølubúðum selja sína egnu framleiðslu, tó bara framleiðslu, sum í sær hevur í mesta lagi 5,8 rúmprosent av alkoholi.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva rúsdrekkaframleiðarum í Føroyum at selja sína egnu framleiðslu, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, á framleiðslustaðnum.

Sum er kann loyvisnevndin loyva føroyskum framleiðarum at selja sína framleiðslu, sum í sær hevur í mesta lagi 5,8 rúmprosent av alkoholi, í egnum *sølubúðum*.

Við hesum lógaruppskotinum fær loyvisnevndin heimild til eisini at loyva framleiðarum at selja sína framleiðslu, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, frá sjálvum *framleiðslustaðnum* í sambandi við gestavitjanir o.tíl. Slík søla verður ikki loyvd frá øðrum sølubúðum, sum framleiðarin hevur, og sum ikki eru á framleiðslustaðnum.

Tað verða tí í største mun útlendsk ferðafólk sum fara at keypa rúsdrekka í samband við vitjan á framleiðslustaðnum. Vitjandi kunnu tó vera bæði útlendingar og føroyingar. Mett verður at hetta ikki fer at økja um útbreiðsluna og nýtsluna av rúsdrekka í Føroyum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Ásett verður, at hóast Rúsdrekkasølan í útgangsstøði hevur einkarætt at selja rúsdrekka, so kunnu fyritøkur, sum framleiða rúsdrekka í Føroyum, fáa loyvi frá Loyvisnevndini at selja egnu framleiðslu, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, beinleiðis frá framleiðslustaðnum.

Loyvi verður givið eftir reglunum í § 7 í matstovulógini, t.e. løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi. Henda áseting er frammanundan galdandi fyri bryggjarí, sum eftir matstovulógini hava fingið loyvi at selja sína egnu framleiðslu av øli við upp í 5,8 rúmprosentum av alkoholi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Føroya Bjór, Oy, Faer Isles Distillery, Vinnuhúsinum, TAKS, Loyvisnevndini, Heilsumálaráðnum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Fólkaheilsustýrinum, Heilbrigdi, Bláa Krossi, Rúsdrekkasølu Landsins.

Harumframt hevur uppskotið ligið alment frammi á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum í tíðarskeiðinum 22. juni til 1. august 2023.

Inn komu xx hoyringarsvar. Víst verður til hjálagda upprit um innkomnar viðmerkingar.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar avleiðingar fyri inntøkuna hjá Rúsdrekkasøluni. Tó so at tá ið framleiðarir ikki keypa vøruna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins, vil tað, alt annað líka, merkja ein inntøkumiss fyri landið, við tað at avlopið hjá Rúsdrekkasølu Landsins møguliga verður ávirka negativt.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur bert smávegis umsitingarligar avleiðingar fyri loyvisnevndina. Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Fyri rúsdrekkaframleiðarar í Føroyum hevur uppskotið ta avleiðing, at teir fáa heimild at selja alla framleiðslu á sjálvum framleiðslustaðnum. Henda søla er kortini avmarkað til sølu í sambandi við vitjanir o.a., og talan er tí ikki um at lata upp serligar sølubúðir, sum eru opnar fyri almenninginum.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við Hoyvíkssáttmálan.

Aðrir viðkomandi millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at lógaruppskotið er í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan, sbr. *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention* og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. *Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.*

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Revsiásetingin verður broytt til eisini at fevna um brot á nýggju og broyttu ásetingarnar í løgtingslógini. Revsingin er eins og frammanundan sekt ella fongsul í upp í 4 mánaðir.

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um avgjøld og skatt.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Treytin fyri at reka virksemi, fevnt av hesi løgtingslóg, er, at loyvi er fingið til tess frammanundan. Henda treyt er grundað á, at neyðugt er við ávísum almennum eftirliti við hesi vinnu, bæði í mun til ta vøru, sum verður seld, í mun til tey avgjøld, sum vinnan skal rinda landinum, og í mun til tær skyldur, m.a. við støði í rúsdrekkapolitikkinum, sum liggja á teimum, ið reka hetta virksemið.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur í § 7, stk. 4 í matstovulógini landsstýrismanninum heimild í kunngerð at áseta nærri treytir fyri 1) loyvum til rúsdrekkaframleiðarar á egnum sølustað at selja ella lata egna framleiðslu sína av øli ella cider, sum í sær hevur í mesta lagi 5,8 rúmprosent av alkoholi, og 2) loyvum til rúsdrekkaframleiðarar at bjóða ella selja vitjandi egna framleiðslu, ið Rúsdrekkasøla Landsins annars hevur einkarætt at selja.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Eftir lógaruppskotinum skal tollvaldið hava eftirlit við, at sølan er í samsvari við reglurnar og tað loyvið, sum fyritøkurnar hava fingið frá Loyvisnevndini. Við hesum verður eftirlitið hjá tollvaldinum víðkað til eisini at fevna um søluna hjá rúsdrekkaframleiðarum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

Løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka verður vanliga kalla rúsdrekkalógin, og við hesum lógaruppskotinum fær løgtingslógin eisini formliga stytt heitið: *Rúsdrekkalógin*.

**Til § 1**
Hetta er sama innihaldsliga endamálsáseting sum er í galdandi løgtingslóg. Greinin er málsliga tillagað eitt sindur, soleiðis at endamálið stendur týðiligari.

Vanliga brúka vit ikki endamálsorðingar í lógum, tí hetta kann eins væl verða lýst í viðmerkingnum. Júst í hesum føri hevur endamálið tó ein sjálvstøðugan týdning, tí talan er um eina løgtingslóg, sum gevur rúsdrekkasøluni einkarrætt til innflutning og sølu av rúsdrekka, men við tí endamáli at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og samfelagið.

At eitt monopol hevur sum endamál at avmarka nýtsluna av sínum vørum og at minka um skaðan, sum brúk av vøruni hevur fyri einstaklingin og samfelagið, er ikki sjálvsagt, og tí verður hildið at endamálið í hesi løgtingslógini er so mikið serstakt og hevur ein sjálvstøðugan týdning, at tað eigur at framganga í sjálvari løgtingslógini.

**Til § 2**
Greinin allýsir hvat rúsdrekka er. Greinin er innihaldsliga óbroytt í mun til galdandi § 2, stk. 1 og 2.

Ásetingin í stk. 3 um at apoteksverkið kann innflyta og selja ethanol til tekniska nýtslu og til heilivágsframleiðslu, er flutt til ta nýggju grein 4, stk. 2, har hon hóskar betur.

*Framleiðsla og innflutningur*

**Til § 3**
§ 3 orðað av nýggjum soleiðis, so at tað er heilt greitt, at tað ikki er loyvt at innflyta, framleiða ella selja rúsdrekka, sum í sær hevur meira enn 60 rúmprosent av alkoholi, ella gera drekkandi tær vørur, sum apoteksverkið hevur heimild at innflyta til m.a. tekniska nýtslu. Talan er ein málslig nágreining av galdandi § 3, stk. 1.

**Til §§ 4 og 5**
Talan er partvíst um lógartøkniligar og málsligar broytingar (§ 4, stk. 1 og 2, og § 5) og partvíst um nýggja áseting (§ 4, stk. 3).

Sum nakað *nýtt* verður ásett í § 4, stk. 3, at fyritøkur og einstaklingar, sum fáast við rúsdrekkaframleiðslu ella sum ætla at fara undir hetta virksemið, kunnu innflyta smærri nøgdir av rúsdrekka ella ethanoli til royndir og vørumenning. Slíkur innflutningur er treytaður av, at virksemið fer fram í hóskandi høli, m.a. tí at talan er um eldfimt tilfar. Loyvið er eisini treytað av, at tollvaldið kann fremja eftirlit við virkseminum, so tryggjað verður, at talan ikki er um framleiðslu, ið er ætlað til sølu.

Í galdandi løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka er ásett, at rúsdrekka kann bara framleiðast á góðkendum framleiðsluvirki. Henda broyting varð gjørd í 2011 í løgtingsmáli nr. 88/2010. Fleiri eru farin undir at framleiða rúsdrekka síðani tá, men treytirnar fyri, at farast kann undir virksemið, hava verið ógreiðar.

Í § 5 verðar tí ásettar greiðar reglur og mannagongdir, tá ið farið verður undir rúsdrekkaframleiðslu.

Ásett verður, at landsstýrismaðurin skal geva loyvi til framleiðsluna. Hetta loyvið er einans treytað av, at viðkomandi myndugleikar hava góðkent øll lið í framleiðsluni: Heilsufrøðiliga starvsstovan skal góðkenna framleiðsluhølini, av tí at talan er um vøru til konsum, Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal góðkenna hølini, av tí at talan kann vera um eldfimt tilfar, og tollvaldið skal tryggja sær, at lógarkravda avgjaldið fyri rúsdrekkaframleiðslu verður roknað og goldið.

*Innflutningur av rúsdrekka*

**Til §§ 6-8**
Talan er um lógartøkniliga broytingar við tað at galdandi § 5 verður býtt sundur í fleiri greinar.

Galdandi § 5, stk. 1 er flutt til § 6, sum staðfestir, at Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarætt at innflyta rúsdrekka við teimum undantøkum, sum eru ásett sambært §§ 7-8. Eisini er heimildin í galdandi § 4, stk. 2 til landsstýrismannin at gera nærri reglur fyri skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins flutt til § 6, stk. 2.

Galdandi § 5, stk. 2 um at persónar, ið hava fylt 18 ár, og sum koma til landið við flogfari ella skipi, kunnu taka við sær rúsdrekka til egna nýtslu, er flutt til § 8.

Galdandi § 5, stk. 3 um innflutning av víni, ætlað til altarnýtslu, er flutt til § 7.

Galdandi § 5, stk. 4 um, at góðkend framleiðsluvirki sjálv kunnu innflyta rúsdrekka og ethanol at brúka til rúsdrekkaframleiðslu, er orðað av nýggjum og flutt til ta nýggju § 4, har hon hóskar betur.

*Søla og útflýggjan*

**Til § 9**
Í hesi grein verður í *stk. 2* sum nakað *nýtt* ásett, at hóast Rúsdrekkasøla Landsins í útgangsstøði hevur einkarætt at selja rúsdrekka, so kunnu fyritøkur, sum framleiða rúsdrekka í Føroyum, selja sína egnu framleiðslu beinleiðis frá framleiðslustaðnum eftir reglunum í § 7 í matstovulógini, t.e. løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi. Sí serligu viðmerkingarnar til § 15 um orðingina av § 7 í matstovulógini.

Henda áseting er frammanundan galdandi fyri bryggjarí, sum eftir matstovulógini hava fingið loyvi til í egnum sølubúðum at selja sína egnu framleiðslu av øli við upp í 5,8 rúmprosentum av alkoholi.

Við hesum lógaruppskotiðinum fær loyvisnevndin heimild til eisini at loyva framleiðarum at selja sína framleiðslu, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, frá sjálvum *framleiðslustaðnum* í sambandi við gestavitjanir o.tíl. Slík søla fer ikki at verða loyvd frá øðrum sølubúðum, sum framleiðarin hevur, og sum ikki eru á framleiðslustaðnum.

Tað verða tí í størsta mun útlendsk ferðafólk sum fara at keypa rúsdrekka í samband við vitjan á framleiðslustaðnum. Hetta kunnu tó bæði vera útlendingar og føroyingar. Mett verður at hetta ikki fer at økja um útbreiðsluna og nýtsluna av rúsdrekka í Føroyum.

Sum gestavitjan verður fyrst og fremst hugsa um, at fleiri persónar saman ella ein bólkur av vitjandi fær t.d. eina rundvísing á framleiðslustaðnum og fær kunning um framleiðsluna og søguna hjá framleiðaranum og í hesum sambandi kunnu smakka framleiðsluna og keypa framleiðslu út við. Vitjandi kunnu vera bæði útlendingar og føroyingar. Sum gestavitjan verður t.d. ikki roknað um ein persónur ella bólkur kemur á framleiðslustaðið einans fyri at keypa rúsdrekka við meira enn 5,8 % av alkoholi í sær; hetta er ikki loyvt.

Ásetingin í *stk. 3* um, at rúsdrekka, sum er framleitt í Føroyum, kann seljast Rúsdrekkasølu Landsins og beinleiðis til flogfør og skip í altjóða sigling, til tollfríar sølubúðir á flogvøllinum og á skipum í altjóða sigling, og til provianteringsfyritøkur, ið selja proviant til flogfør og skip í altjóða sigling, er tikin við óbroytt frá galdandi løgtingslóg. Eins og frammanundan hevur tollvaldið eftirlit við hesi sølu.

**Til § 10**
Ásetingin er orðað av nýggjum. Talan er einans um málsligar broytingar; eingin innihaldslig broyting er gjørd.

**Til § 11**
Ásannandi at lýsingar, lýsingarhættir og marknaðarføring yvirhøvur er munandi broytt, síðani løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka kom í 1992, er neyðugt at orðað forboðið móti rúsdrekkalýsingum av nýggjum.

Eins og frammanundan er ikki loyvt at lýsa við rúsdrekkasølu, skeinking og útflýggjan, men við broyttu ásetingini er greitt, at forboðið er eisini galdandi fyri lýsingar á talgildum miðlum, sum venda sær til viðskiftafólk í Føroyum.

**Til § 12**
Ásetingin er óbroytt og er tann sama sum § 20 í galdandi løgtingslóg.

*Revsing*

**Til § 13**
Ásetingarnar um revsing í § 13, stk. 1 eru broyttar soleiðis, at tær eisini fevna um nýggju ásetingarnar í løgtingslógini. Revsingin er eins og frammanundan sekt ella fongsul í upp í 4 mánaðir, um ikki hægri revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars.

**Til § 14**
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og at galdandi rúsdrekkalóg úr gildi.

*Broyting í aðrari lóggávu*

**Til § 15**
Sum ein fylgibroyting til § 9 í lógaruppskotinum, sum fer at loyva at fyritøkur, sum framleiða rúsdrekka í Føroyum, kunnu selja sína egnu framleiðslu beinleiðis frá framleiðslustaðnum, verður neyðugt at broyta § 7 í matstovulógini soleiðis, at heimild loyvisnevndarinnar verður víðkað til eisini at fevna um framleiðslu, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi.

Við hesum lógaruppskotiðinum fær loyvisnevndin heimild til eisini at loyva framleiðarum at selja sína framleiðslu, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, frá sjálvum

*framleiðslustaðnum* í sambandi við gestavitjanir o.tíl. Slík søla fer ikki at verða loyvd frá øðrum sølubúðum, sum framleiðarin hevur, og sum ikki eru á framleiðslustaðnum.

Tað verða tí í størsta mun útlendsk ferðafólk sum fara at keypa rúsdrekka í samband við vitjan á framleiðslustaðnum. Vitjandi kunnu tó vera bæði útlendingar og føroyingar. Mett verður at hetta ikki fer at økja um útbreiðsluna og nýtsluna av rúsdrekka í Føroyum.

Eins og frammanundan kann Loyvisnevndin taka aftur loyvi, um framleiðarin brýtur treytirnar fyri loyvinum.

Løgmálaráðið, dagfesting.

**Bjarni Kárason Petersen**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá...
Fylgiskjal 3: Ummæli frá...